

Krista Mørkøre

# Krista klárar kravtíð

**SVIMJING** 12 ára gamla klaksvíksgentan kláraði kravtíðina til EM í svimjikapping í Berlin í gjár

Hilmar Jan Hansen

Í hesum døgum er stór altjóða svimjikapping fyri brekað í Berlin, German Open, har umleið 450 svimjarar úr 30 londum eru við. Teirra millum er 12 ára gamla Krista Mørkøre úr svimjifelagnum Ægir, sum umboðar ÍSB í stóru kappingini.

Krista skal í Berlin bæði kappast við svimjarar í sínum egna aldursbólki, umframt svimjarar, sum eru í sama handicapbólki, og hon er við í kappingum í bæði frísvimjing, bringusvimjing og firvaldssvimjing.

Fyrsta kappingin var í gjár í 50 metra frísvimjing, har Krista kláraði kravtíðina til EM í summar, tá hon fekk tíðina 35,11 sekund, sum er eitt fitt petti niðan fyri kravtíðina, ið er 35,67 sekund. Hetta úrslitið gav Kristu eitt bronsuheiðursmerki í ungdómsbólkinum og eitt níggjundapláss í opna bólkinum.

Í dag skal Krista kappast í 100 metra frísvimjing, 50 metra firvaldssvimjing og 200 metra bringusvimjing, umframt at hon aftur skal í hylin sunnudagin.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# ÍF og HB spæla í kvøld

**FÓTBÓLTUR** Fyrsti dysturin í fimta umfari verður í Fuglafirði í kvøld, og so verða hinir fýra dystirnir allir spældir í morgin

Hilmar Jan Hansen

Skjótt gongur tíðin, tí tá dystirnir í Vodafone-kappingini eru spældir um vikuskiftið, er fyrsti triðingur av landskappingini longu komin í helvt. Fyrsti dysturin í hesum fimta umfarin verður spældur í Fuglafirði í kvøld klokkan 18.30, tá ÍF tekur ímóti HB. Serliga ÍF man fara at leggja nógv fyri, tí fýra av 12 møguligum stigum er ov lítið, men neyvan eru teir í HB heldur nøgdir við síni sjey stig, so her kann helst alt henda.

B71 er einasta liðið, ið enn einki stig hevur fingið, og talan hevur tvær ferðir verið um tennisúrslit. Nú skulu sandoyingar aðru ferð á rað taka ímóti á sínum nýggja graslíkisvølli, har gestirnir verða B68, sum bara hevur fingið eitt stig. Við øðrum orðum er hetta botnuppgerðin hesa ferð.

Hinvegin er toppdysturin uttan iva tann í Gundadali, sum er millum B36 og EB/Streym. Serliga gestirnir úr EB/Streymi hava havt sera góðan vind í seglunum, men B36 hevur eisini staðið seg munandi betur enn undanfarin ár, tá úrslitini ikki hava verið nøktandi.

Bara eitt lið er framman fyri sundalagsmenn, og tað eru uppflytararnir úr KÍ, sum hava lagt til brots við fullari ferð. Hesa ferð tekur KÍ ímóti NSÍ, sum eisini hevur havt toluliga byrjan við torførari móststøðu.

At enda spælir Víkingur á heimavølli ímóti 07 Vestur. Víkingur er eitt av liðunum, ið liggur beint aftan fyri trý tey fremstu, og ta støðuna vilja gøtumenn og leirvíkingar neyvan spæla sær av við, hóast fleiri munnu vera á einum máli um, at 07 Vestur hevur víst meira, enn einsamalla stigið kundi bent á.

*hilmarjan@sosialurin.fo*



*Fuglfirðingar takað ímóti føroyameistarunum í kvøld*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Dystir um vikuskiftið

**VODEFONE-DEILDIN**

| | | |
|---|---|---|
| 29/04 | 18.30 | ÍF-HB |
| 30/04 | 15.00 | B71-B68 |
| 30/04 | 15.00 | B36-EB/Streymur |
| 30/04 | 17.00 | KÍ-NSÍ |
| 30/04 | 18.30 | Víkingur-07 Vestur |

**1. DEILD MENN**

| | | |
|---|---|---|
| 30/04 | 17.15 | HB II-AB |
| 01/05 | 13.30 | 07 Vestur II-FC Hoyvík |
| 01/05 | 14.45 | FCS-EB/Streymur II |
| 01/05 | 15.00 | NSÍ II-Víkingur II |
| 01/05 | 15.00 | Skála-TB |

**1. DEILD KVINNUR**

| | | |
|---|---|---|
| 01/05 | 12.30 | HB-AB |
| 01/05 | 17.15 | B36-Víkingur |
| 01/05 | 19.00 | Skála-KÍ |

## Føroyska Vodafonedeildin

vodafone deildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 4 | 3 | 1 | 0 | 13 | 4 | +9 | 10 |
| 2 | EB/Streymur | 4 | 3 | 1 | 0 | 9 | 3 | +6 | 10 |
| 3 | B36 | 4 | 2 | 2 | 0 | 9 | 3 | +6 | 8 |
| 4 | Víkingur | 4 | 2 | 1 | 1 | 11 | 5 | +6 | 7 |
| 5 | HB | 4 | 2 | 1 | 1 | 8 | 2 | +6 | 7 |
| 6 | NSÍ | 4 | 2 | 1 | 1 | 7 | 6 | +1 | 7 |
| 7 | ÍF | 4 | 1 | 1 | 2 | 5 | 9 | -4 | 4 |
| 8 | B68 | 4 | 0 | 1 | 3 | 4 | 8 | -4 | 1 |
| 9 | 07 Vestur | 4 | 0 | 1 | 3 | 3 | 12 | -9 | 1 |
| 10 | B71 | 4 | 0 | 0 | 4 | 1 | 18 | -17 | 0 |

## Føroyska 1. Deild kvinnur

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 4 | 3 | 1 | 0 | 15 | 2 | +13 | 10 |
| 2 | AB | 4 | 3 | 1 | 0 | 15 | 3 | +12 | 10 |
| 3 | Víkingur | 4 | 1 | 1 | 2 | 10 | 10 | 0 | 4 |
| 4 | Skála | 4 | 1 | 1 | 2 | 4 | 8 | -4 | 4 |
| 5 | B36 | 4 | 1 | 1 | 2 | 2 | 9 | -7 | 4 |
| 6 | HB | 4 | 0 | 1 | 3 | 1 | 15 | -14 | 1 |

# Heiðra tey bestu í Vági

**HONDBÓLTUR** Um 300 hondbóltsfólk hava teknað seg til gallaveitsluna hjá hondbóltinum, sum verður í ítróttarhøllini í Vági í annaðkvøld. Millum annað verða ársins bestu heiðrað

Hilmar Jan Hansen

Vágbingar hava í vikuni gjørt nógv burturúr at pynta og annars gera klárt til stóru gallaveitsluna hjá hondbóltinum í annaðkvøld, sum VB í ár er vertur fyri. Sjálvt borðhaldið verður í ítróttarhøllini og so verður dansurin aftaná í VB-húsinum.

Tilsamans hava um 300 fólk teknað seg til veitsluna, har sjálvsagda hæddarpunktið verður, tá tey bestu í hondbóltskappingini í vetur skulu heiðrast. Sum vanligt, hevur atkvøðugreiðsla verið, men umframt teir heiðrarnar, hava landsliðsvenjararnir hjá kvinnum og monnum eisini hesa ferð tikið út hvør sítt ársins lið.

Undanfarnu árini hevur H71 skipað fyri serligari gallaveitslu fyri tey 17 ára gomlu, men veitslan hesa ferð, ið skuldi verða leygarkvøldið 9. apríl, varð tíverri av ongum, tí undirtøkan hesa ferð var ov lítil.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Fimleikur á Hálsi

Hilmar Jan Hansen

Seinnapartin í morgin skipar Fimleikasambandið fyri fimleikakappingar í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Væntast kann, at hetta verða javnar kappingar, tí í vetur hevur munurin á liðunum verið sera lítil.

Fyrst verður B-kappingin hjá pinkum, smágentum og gentum klokkan 13, har sjey lið hava meldað til, og síðani verður FM-kappingin hjá pinkum og smágentum klokkan 15.30, har átta lið eru tilmeldað.

Dómarar í kappingunum í morgin eru Jeanette Blásvær, Beinta Danielsen, Heidi Davidsen, Dagmar Clothier, Elin Guttesen, Elna Johannesen, Guðrun M. Hansen, Eva M. Holm, Maj Johannesen, Poula M. Kass og Anna Rein.

*hilmarjan@sosialurin.fo*